

Joan Jett hevur leingi livað opið sum tvíkynd

mynd: scanpix

# Carmen Electra heldur seg til rokkstjørnurnar

Fyrrverandi Baywatch stjørnan Carmen Electra fór í summar frá rokkstjørnumanni sínum Dave Navarro, men nú tykist Electra at vera follin fyri eini aðrari rokkstjørnu. Eftir eina konsert hjá Joan Jett & The Blackhearts í Los Angeles herfyri, vórðu Electra og Jett sambært blaðnum Star sæddar, meðan tær fríggjaðu lystiliga.
Í vár gjørdi Joan Jett sjónbandalagið A.C.D.C, har hon flirtar við Carmen Electra. Tað var undir upptøkunum, at tær eftir øllum at døma fullu fyri hvør aðrari. Lagið A.C.D.C var upprunaliga innspælt av The Sweet og lovprísar tvíkynd. Hetta var meðan Dave Navarro enn var inni í myndini. Tí er ikki óhugsandi, at gittarleikarin, ið hevur gjørt um seg í Jane's Addiction og Red Hot Chili Peppers í veruleikanum varð útskiftur við tí nú 46 ára gomlu One Hit Wonder sangarinduna handan I Love Rock'N Roll.

Carmen Electra hevur áður kyst bæði Pamelu Andersson og Paris Hilton



## HITLIST

### 15 tær bestu

ÚF

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nephew | Igen & Igen & |
| 2 | Týr | Wings Of Time |
| 3 | Laila Hansen & Arnfríð Lützen | Don't Just Wanna Be |
| 4 | The Dreams | Nummar |
| 5 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 6 | Scissor Sisters | I Don´t Feel Like Dancin' |
| 7 | The Killers | When You Were Young |
| 8 | Justin Timberlake ft. T.I. | My Lovee |
| 9 | U2 & Green Day | The Saints Are Coming |
| 10 | Panic! At The Disco | I Write Sins Not Tragedies |
| 11 | My Chemical Romance | Welcome To The Black Parade |
| 12 | Robbie Williams | Lovelight |
| 13 | James Morrison | You Give Me Something |
| 14 | Infernal | Self Control |
| 15 | The Pussycat Dolls | I Don't Need |

### Eykaløg

| | |
|---|---|
| Teitur | I Don't Want You To Wake Yo |
| Europe | Always The Pretenders |
| Westlife | The Rose |
| Razorlight | America |
| Jensina Olsen | Just Because |

### Tjeklisten

DR

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Justin Timberlake ft. T.I. | My Lovee |
| 2 | Nephew | Igen & Igen & |
| 3 | U2 & Green Day | The Saints Are Coming |
| 4 | The Killers | When We Were Young |
| 5 | Scissor Sister | I Don't Feel Like Dancin' |
| 6 | My Chemical Romance | Welcome To The Black Parade |
| 7 | Kashmir | Kalifornia |
| 8 | Nik & Jay | Når Et Lys Slukkes |
| 9 | Keane | Crystal Ball |
| 10 | Robbie Williams | Lovelight |
| 11 | Thomas Helmig | Op og Ned |
| 12 | Infernal | Self Control |
| 13 | Peter Sommer | Livets Gang I Virkelyst |
| 14 | Madonna | Jump |
| 15 | Panic! At The Disco | I Write Sins Not Tragedies |
| 16 | Sterling | Ikke Rigtig I Mit Hoved |
| 17 | Christina Aguilera | Hurt |
| 18 | Depeche Mode | Martyr |
| 19 | moi Caprice | Drama Queen |
| 20 | Pink | U + Ur Hand |

### Top of the Pops

BBC

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Akon ft. Eminem | Smack That |
| 2 | Justin Timberlake ft. T.I. | My Love |
| 3 | Westlife | The Rose |
| 4 | Take That | Patience |
| 5 | Beyonce | Irreplaceable |
| 6 | Fedde Le Grand | put Your Hands Up For Detroit |
| 7 | All Saints | Rock Steady |
| 8 | Robbie Williams | Lovelight |
| 9 | U2 & Green Day | The Saints Are Coming |
| 10 | Bodyrox Ft Luciana | Yeah Yeah |
| 11 | Christina Aguilera | Hurt |
| 12 | Girls Aloud | Something Kinda Ooooh |
| 13 | My Chemical Romance | Welcome To The Black Parade |
| 14 | Razorlight | America |
| 15 | Amy Winehouse | Rehab |
| 16 | Sugababes | Easy |
| 17 | Bob Sinclair & Cutee B | Rock This Party (Everybody Dance Now) |
| 18 | Snow Patrol & Martha Wainwright | Set Fire To The Third Bar |
| 19 | Scissor Sister | I Don't Feel Like Dancin' |
| 20 | Madonna | Jump |

### Billboard

Billboard

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Justin Timberlake ft. T.I. | My Love |
| 2 | Akon ft. Eminem | Smack That |
| 3 | Fergie | Fergalicious |
| 4 | Beyonce | Irreplaceable |
| 5 | Hinder | Lips Of An Angel |
| 6 | Ludacris ft. Pharrell | Money Maker |
| 7 | The Fray | How To Save A Life |
| 8 | Jay-Z | Show Me What You Got |
| 9 | Snow Patrol | Chasing Cars |
| 10 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 11 | The All-American Rejects | It Ends Tonight |
| 12 | Chris Brown | Say Goodbye |
| 13 | Nickelback | Far Away |
| 14 | Bow Wow Featuring Chris Brown & Johnta Austin | Shortie Like Mine |
| 15 | JoJo | Too Little Too Late |
| 16 | Carrie Underwood | Before He Cheats |
| 17 | Akon ft. Snoop Dogg | I Wanna Love You |
| 18 | Danity Kane | Show Stopper |
| 19 | Jim Jones | We Fly High |
| 20 | P. Diddy ft. Nicole Scherzinger | Come To Me |

sound

# Av Letterman og beint í geglið



The Game er í vanda fyri at enda í geglinum.

Rapparin The Game varð hósdagin tikin av løgregluni í einum hýruvogni, eftir at hava luttikið á The Late Show við David Letterman. Sambært løgregluni hevði The Game bilt einum hýruvognsførara inn, at hann var løgreglumaður og sostatt fingið hýruvognføraranum at koyra alt ov skjótt millum annað yvirum fleiri reyð ferðsluljós. The Game er nú ákærdur fyri at lata sum um, at hann var løgreglumaður, skrivar Billboard.com.
Jeffrey Lichtan, sakførari hjá The Game noktar at ákærurnar eru sannar. Hann greiðir frá, at løgreglan var eftir The Game, frá tí løtu hann kom til New York. Jeffrey Lichtman sigur, at talan var um ein sera vánaligan hýruvognsførara. Hann sigur við Billboard.com, at tað er burturvið, at løgreglan á hendan hátt ger seg inn á The Game og restina av hip hop umhvørvinum.

**nud**

# Michael Jackson fjepparar í øðini

Frammanundan nógv umrødda come back framførslan hjá Michael Jackson á World Music Awards, var eitt somikið stórt vónbrot, at nógvir av fjepparunum, ið høvdu goldið £100 fyri atgongumerkið, nú krevja peningin aftur, skrivar bt.dk. Tað var væntað, at Jackson fór at syngja Thriller, men so varð ikki. Ístaðin upplivdu áskoðarnir, at Chris Brown sang eina lániútgávu av lagnum. Meðan Jackson sjálvur bert sang eitt niðurlag av gamla neyðhjálparklassikaranum We are the World, ið eitt barnakór framførdi.



Michael Jackson sang nakrar reglur saman við einum barnakóri.

mynd: Scanpix.dk

**nud**



# Jordan vísir síni undirklæði

Meðan Victoria's Secret hevði savnað nøkur av heimsins kendastu undirklædnamodellunum í Los Angeles fyri at vísa teirra nýggjastu undiklædna kollektión, hevði bretska nakinmodellin Jordan eina heldur egna sýning av síni nýggju undirklædna kollektión. Jordan gekk nevniliga sjálv á odda, tá klæðini skuldu vísast fram, skrivar tv2.dk. Hon hevði sjálvandi eisini aðrar modellir afturat sær á mótasýningini, fyri fjølmiðlar og serlig innboðin í London. Tað var, tó eingin ivi hvør stjørnan var, tá Jordan við sínum G skál bróstum gekk á catwalkinum.

Jordan er vanliga í uppaftur færri klæðum, tá myndir skulu takast.

mynd: scanpix.dk

**nud**